

– Fólk eru blíð, vinarlig og serstakliga fyrikomandi, sigur Jack Thomsen



Knud Andersen er hálvur føroyingur og er formaður í landsfelagnum, »Livandi Hav«

## » Nei, vit høvdu ikki so frægt sum bjargingarvestar. Menninir svóvu á dekkinum, og eg svav fyri tað mesta uppi á stýrhúsdekkinum

eingin tari at síggja, tí tari eksisteraði slett ikki á hesi leið.

### Kenna ikki snellu

Fiskimenninir í Eritrea, sum Jack og Knud hjálptu, hava ongantíð sæð eina snellu áður. Teir brúka í staðin onkra dorg við lítlum loddi og einum húki.

– Vit kundu tí hugsað okkum at funnið út av, um tað ber til at royna við snellu, og her halda vit, at hondsnella hevði verið fín í byrjanini. Tí ynskja vit at finna onkran, sum eigur onkra hondsnellu at lata okkum til hesar royndir, tá vit koma niður aftur í mars. Vit kundu soleiðis eisini ynskt okkum at havt nakrar teinar og smærri lodd niður við aftur.

Jack vísir á, at korallirnar eru sum ein skógur á botni, og tí átti hetta at verið áhugaverdur botnur hjá ymiskum fiskasløgum at krógvað seg í.

– Longri úti á djúpari vatn vænta vit at kunna fiska størri og dýrari fiskasløg, leggur hann aftrat.

### Ikki ríkur

Jack Thomsen letur væl at fólkinum í Eritrea. Tey eru ómetaliga fitt, blíð og fyrikomandi.

– Hjá okkum, sum komu niður til Eritrea at leggja fátækum fiskimonnum lag á, er hetta ikki nakað, tú gerst ríkur av. Tað, sum ríkar teg á eini slíkari ferð, er upplivilsi og tað, at tú kanst hjálpa øðrum, sum eru nógv verri fyri enn vit.

Jack vísir á, at skalt tú luttaka í eini slíkari verkætlan, er fyritreytin hon, at tú hevur áhuga fyri fólkinum og samfelagnum.

– Tað nyttar einki bara at senda bátar, skip ella útgerð niður til hesi fólk. Neyðugt er eisini, at tú fert við og lærir tey at brúka útgerðina. Tað er altavgerandi, sigur hann.

Umstøðurnar eru vánaligar, og nólsoyingurin sigur, at hóast teir vóru 14 mans á bátinum á hesum báðum túrunum, var eingin bjargingarútgerð umborð á bátinum.

– Nei, vit høvdu ikki so frægt sum bjargingarvestar umborð á bátinum. Menninir svóvu á dekkinum, og eg svav fyri tað mesta uppi á stýrhúsdekkinum. Eina løtu seinnapartin løgdu vit stilt, tí hitin var so nógvur, sigur hann.

Jack vísir á, at teir høvdu umleið hálvt annað tons av fiski eftir at hava roynt í fimm dagar.

– Í býnum vóru eini tvey markaðarpláss, og vit skiltu, at prísurin á summum fiskasløgum er rættiliga høgur, kanska upp í einar 500 krónur fyri kilo. Annars lá prísurin millum einar 100-300 krónur fyri kilo. Men tað eru ikki fólk í Eritrea, sum hava ráð til at keypa og eta fisk, sum er so dýrur. Tað eru helst fólk í teimum ríkaru arabaralondunum og ríkir evropearar, sum keypa fiskin, sigur Jack Thomsen.

vilmund@sosialurin.fo



– Fiskasløgini vóru ymisk og øðrvísi enn tey vit kenna um okkara leiðir, sigur Jack Thomsen

Vetrarútsølan
byrjan mánamorgunin
24. januar kl. 9.00
Dr. Jacobsensgøta 21,
tel. 315 315
Skálabúðin
MÓTASKÁLIN
Sosialurin 341800